**Brúkaraumboðið**

## Vegleiðing um ómaksgjøld

## Innihald

1. Inngangur ........ 1
2. Alment um nýtsluøkið hjá § 15 ........ 2
3. Hvussu verður "ómaksgjald" skilmarkað ........ 5
4. § 15, stk. 1 ........ 8
5. § 15, stk. 2 ........ 9
 5.1 Varskó um smávegis broytingar ........ 9
 5.2 "Við rímiligari freist" ........ 10
6. § 5, stk. 3 ........ 11
 6.1 Munandi broytingar ........ 11
 6.2 Framferðarháttur, tá samskift verður við einstakling ........ 13
 6.3 Innihaldskrav til varskógvan ........ 14
7. Rættarvirknaður verður § 15 o.a. brotið ........ 15
8. Avtalan millum tann vinnurekandi og brúkaran ........ 15

### 1. Inngangur

Við lógini um marknaðarføring er ein regla í § 15, sum viðger møguleikan hjá vinnurekandi í sáttmálaviðurskiftum at broyta ómaksgjøld og at leggja nýggj gjøld á.

Talan er um eina reglu í almannarætti, sum ikki skipar avtalurættarligar ella aðrar sivilrættarligar partar í avtaluni. Tað merkir, at § 15 nemur ikki beinleiðis við sáttmálaviðurskiftini ímillum tann vinnurekandi og brúkaran. Tað merkir eisini, at ikki er nóg mikið hjá vinnurekandi at lúka krøvini sambært § 15 fyri at kunna hækka eitt ómaksgjald ella áseta nýggj ómaksgjøld. Slíkar broytingar skulu hava heimild í avtaluni partanna millum, sí 8. part um tað. Brot á § 15 kunnu hinvegin hava við sær forboð ella boð frá Brúkaraumboðnum eftir

reglunum í lóg um marknaðarføring viðvíkjandi tí, og brot á § 15, stk. 3 kann verða revsað við bót.

Áðrenn § 15 í lóg um marknaðarføring varð sett í verk, varð staðfest í dómsvenju, at ikki er loyvt at brúka avtalutreytir, sum við sínum orðalagi loyva tí vinnurekandi óavmarkað og av sínum eintingum at krevja gjøld ella at broyta gjaldsupphæddir. Hesin dómur er nágreiniligari umrøddur í 2. parti.

Endamálið við § 15 er  at gera tað gjøgnumskygt, hvussu gjøld verða brúkt, og hvør sanni kostnaðurin á vørum og tænastuveitingum er.

Tilvísingarnar til lógargreinir niðanfyri vísa allar til lóg um marknaðarføring, um ikki annað stendur viðmerkt.

## 2. Alment um nýtsluøkið hjá § 15

Í Danska bank – málinum frá 1999[1] varð staðfest , at ikki er loyvt at brúka treytir um ómaksgjald, sum við sínum orðalagi loyva tí vinnurekandi óavmarkað og av sínum eintingum at krevja gjøld ella at broyta gjaldsupphæddir. Av tí at eingin serlig áseting um gjøld var í lógini um marknaðarføring tá, var tað sambærið millum sáttmálatreytir bankans við § 1 um góðan marknaðarføringssið, sum dømt var um.

Sjó- og handilsrætturin kom til ta niðurstøðu, at tilvildarligar broytingar sambært reglum (handilstreytum) , sum vinnurekandi av sínum eintingum hevði

[1] Sjó- og handilsrættardómur tann 26. januar 1999, U.1999, 633S.

ásett í virknum handilsviðurskiftum við ein brúkara, gingu ímóti góðum marknaðarføringssiði. Ræ		turin sá heldur ikki nakað grundarlag í lóggávuni fyri, at tilvildarligu broytingarheimildirnar høvdu samtykki frá lóggávuvaldinum og setti forboð fyri at brúka hesar treytir fyri ómaksgjald. Við áherðslu á tilvildina í málinum legði Sjó- og handilsrætturin dent á – soleiðis sum Brúkaraumboðið sær málið – at brúkarin ánaði einki um hesar broytingar frammanundan. Rætturin vísti í tí sambandi eisini á ta støðu, ið bankin hevði mótvegis brúkaranum, av tí at einstaki brúkarin illa kann lúka broytingar í treytum t.d. í sambandi við bankaskifti. Alment viðmerkti rætturin eisini, at § 1 eisini vardi brúkaran ímóti viðurskiftum, sum vóru minni grov enn beinleiðis ósømiligar sáttmálatreytir.

Eitt týðandi atlit í § 15 er, at brúkarin skal kunna rokna seg fram til broytingar og at gera gjøld í sáttmálaviðurskiftum sjónlig. Tá ið avtala verður undirskrivað, skal brúkari hava møguleika at meta um, hvussu dýr avtalan seinni kann fara at verða, og eisini hava ein møguleika seinni at meta um, um broytingarnar eru í samsvari við avtaluna.

Nýggj og broytt gjøld (kunnu) koma brúkara dátt við og kunnu verða fatað sum ískoytisgjøld, sum brúkari als ikki var varugur við, tá ið avtalan varð gjørd. Sambært viðmerkingum fer uppskotið at "skapa gjøgnumskygni í sambandi við gjøld", tí undir hesum verður gjørt vart við "um so er, gjøld verða broytt og nýggj gjøld verða løgd á í virknum sáttmálaviðurskiftum eftir, at avtala er gjørd, er neyðugt at tryggja, at brúkarar verða gjørdir varugir við hesi viðurskifti og at krevja, at tann vinnurekandi boðar brúkarum frá hesum broytingum.

Í sambandi við sjálvt innihaldið er greitt , at "treytirnar fyri at kunna broyta upphædd ella krevja ómaksgjald fyri avtalu í gildi, sum er brúkaranum til ógagns, mugu vera týðiligar í avtaluni. Broytingin skal sambært stk. 2 verða fráboðað, áðrenn hon verður sett í verk. Hesar ásetingar skulu skiljast í samsvari við vanligu reglurnar í føroyskum ognarrætti, og eftir teimum kann annar parturin einsamallur ikki broyta nakað, uttan so at heimild er fyri tí í avtaluni.

Eisini er greitt, at brúkarin beinleiðis skal hava at vita, at hann kann velja nýtt ómaksgjald ella munandi broytt ómaksgjald frá og sleppa úr avtaluni: "Brúkarin skal verða kunnaður um teir møguleikar, hann sambært avtalu hevur fyri at sleppa úr avtaluni, áðrenn broytingar í gjøldum verða settar í gildi. Fráboðanirnar skulu sostatt gjøllari lýsa treytirnar fyri at siga avtaluna upp, eisini skotbrá til uppsagnarfráboðanina og møgulig gjøld í sambandi við uppsøgnina".

Orðaljóðið í § 15 er soleiðis:

**§ 15.** Um støddin ella innkrevjingin av einum ómaksgjaldi, sbr. § 13, stk. 5, sum ikki er ásett við lóg, í einari avtalu, sum gongur yvir tíð, kann broytast á neiligan hátt fyri brúkaran, skal skilliga leggjast dentur á treytirnar fyri hesum í avtaluni.

*Stk. 2.* Broytingar í ómaksgjøldum ella innkrevjing av nýggjum ómaksgjøldum í einari avtalu, sum gongur yvir tíð, skulu altíð fráboðast við rímiligari freist, áðrenn hetta fær virknað fyri brúkaran.

*Stk. 3.* Er broytingin í ómaksgjaldi munandi, ella verður nýtt ómaksgjald kravt, skal hetta fráboðast brúkaranum við individuellum samskifti, áðrenn broytingin fær virknað. Hevur brúkarin rætt at siga avtaluna upp, skal hetta standa í fráboðanini, umframt við hvørjum treytum brúkarin kann siga avtaluna upp.

§ 15 fevnir bara um gjøld, sum ikki eru skipað við (aðrari) lóg.

Fatanin hjá Brúkaraumboðnum er, at ásetingin kann eisini verða brúkt til gjøld, sum bara fyri ein part eru skipað við aðrari lóg. § 15 er tá galdandi fyri tann partin, ið ikki er fevndur av aðrari lóg.

Ásetingin í § 15 ásetur ikki, hvat ómaksgjøldini kosta, t.e. hvussu stór ómaksgjøldini kunnu vera, ella hvussu nógv eitt ómaksgjald kann hækka. Ásetingin tekur heldur ikki støðu til tað at leggja ómaksgjald á, t.e. hvørji ómaksgjøld verða kravd . Seinasti spurningur kann kortini eftir umstøðunum í staðin verða fevndur av § 1 í lógini um góðan marknaðarføringssið, og eftir henni kann verða lagt upp í órímiligar sáttmálatreytir. § 15 ásetur nøkur krøv til form og mannagongdir, sum tann vinnurekandi skal halda seg til við tí í hyggju at tryggja, at brúkararnir varnast, tá ið gjøld broytast og nýggj gjøld verða løgd á.

Ásetingin er eftir sínum orðaljóði bara galdandi fyri "avtalur, ið ganga yvir tíð". Sum Brúkaraumboðið skilir hetta, er tað eisini galdandi fyri stk. 3, sjálvt um treytin ikki er nevnd her. Við "avtalur, ið ganga yvir tíð" verða vit at skilja avtalur, sum fevna um eitt ávíst tíðarskeið – tað veri seg í sambandi við tað, ið tann vinnurekandi veitir, ella gjaldið hjá brúkaranum.

Sambært § 2, stk. 3 verður § 15 ikki nýtt fyri **fíggjarfyritøkur**.

## 3. Hvussu verður "ómaksgjald" skilmarkað

§ 15 geldur bara teir kostnaðir, sum kunnu beinast undir skilmarkingina av ómaksgjaldi í lógini um marknaðarføring. Í § 13, stk. 5 er skilmarkað, hvat lógin um marknaðarføring skilir við ómaksgjald:

§ 13, stk. 5 ger greitt, at Eitt ómaksgjald er ein upphædd, sum verður goldin fyri eina serliga tænastu, funksjón ella veiting, sum er knýtt at keypinum av eini vøru ella tænastu, og sum ikki verður rindað fyri eina sjálvstøðuga veiting.

Avgerandi er ikki, hvussu kostnaðurin verður nevndur í avtaluni, men um hann er av slíkum slagi, at hann kemur undir skilmarkingina.

Sum dømi um ómaksgjøld kunnu nevnast rokninga-ómaksgjøld, gjalds-ómaksgjøld og uppsagnar-ómaksgjøld og eitt telefonhald, tá ið goldið verður fyri eina ávísa nummarfunksjón.

Eisini verður gjørt vart við, at ómaksgjøld kunnu vera bæði tvingað og valfrí, og at tey vanliga bera boð um, at prísurin á vøru ella tænastuveiting verður býttur í fleiri ymiskar partar, á tann hátt kann gjaldið fyri høvuðsveitingina tykjast minni, og truplari verður hjá brúkara at gjøgnumskoða samlaða prísin. Tá ið mett verður, um talan er um ómaksgjald sambært lóg um marknaðarføring, krevst ein rættiliga breið tulking, skal sleppast út um hana.

Skilmarkingin av ómaksgjøldum í § 13, stk. 5 hevur bæði eina positiva og eina negativa avmarking. Positiva avmarkingin sæst í fyrsta liði í ásetingini, sum snýr seg um gjøld fyri veiting, sum beinleiðis ella óbeinleiðis knýtir seg at at fáa ella at lata eina vøru ella tænastuveiting. Hetta tilknýtið kann koma til sjóndar á ymsan hátt, men felagseyðkenni er, at "eykaveitingin" má haldast at vera ein eyka partur av tí høvuðsveiting, brúkarin hevur keypt, og kostnaðurin av hesi "eykaveiting" má haldast at vera eitt ómaksgjald sambært lógini um marknaðarføring.

Talan kann vera um eitt neyðugt samband ímillum tvær veitingar, skilt á tann hátt, at ikki ber til at brúka høvuðsveitingina eftir ætlan uttan hina veitingina ("eykaveitingina").

Tær báðar veitingarnar kunnu t.d. hanga saman, uttan at sambandið er neyðugt og treytað, sum nevnt frammanundan, men heldur soleiðis, at ikki er neyðugt at útvega sær eykaveitingina, men bara høvuðsveitingina. Sum dømi um hesa støðu kann sambært longu nevnda forarbeiði nevnast vís-nummar-funksjónin, sum ikki er neyðug fyri at brúka telefonhaldið, men sum er høpisleyst at útvega sær við ongum haldi.

Eisini í øðrum førum kann tað sambært Brúkaraumboðnum vera talan um, at eykaveitingin knýtir seg at høvuðsveitingini á slíkan hátt, at hon má haldast at vera natúrligur partur av veitingini.

Seinasti liður í skilmarkingini í § 13, stk. 5, telur ikki gjøld við, "sum (...) ikki verða rindað fyri sjálvstøðuga veiting". Her má kravið um tilknýti til aðra veiting verða neyvari tilskilað. Hetta tilknýtið skal vera so leyst, at talan er um heilt sjálvstøðugt gjald, áðrenn gjaldið sleppur undan § 15. Sum dømi um sjálvstøðugar veitingar, sum fingnar eru hvør sær, kundi verið eitt avrit av gomlum kontuavriti.

Tær umstøðurnar, at kostnaðurin møguliga ikki skal verða upplýstur, tá ið avtala verður gjørd sum partur av samlaða prísinum eftir § 13, stk. 1 og 2, tí tað ikki er viðkomandi , tá ið keypt varð, er eftir Brúkaraumboðsins tykki uttan týdning fyri, um talan er um sjálvstøðuga veiting ella eina eyka veiting av aðrari veiting (høvuðsveiting). Gjørt verður vart við, at spurningurin um, nær kostnaður verður taldur við í prískunningina, sum verður latin brúkara, má ikki koma í bland við kravið um, at kostnaðurin skal verða heimilaður í avtaluni, sí brot 8.

## 4. § 15, stk. 1

§ 15, stk. 1 ljóðar soleiðis:

Um stoddin ella innkrevjingin av einum ómaksgjaldi, sbr. § 13, stk. 5, sum ikki er ásett við lóg, í einari avtalu, sum gongur yvir tíð, kann broytast á neiligan hátt fyri brúkaran, skal skilliga leggjast dentur á treytirnar fyri hesum í avtaluni

Sum nevnt var í øðrum parti, at áðrenn § 15 í lóg um marknaðarføring kom í gildi, var tað føst rættarsiðvenja, at ikki var loyvt at brúka ómaksgjaldsklausulir, sum eftir orðaljóði loyvir tí vinnurekandi óavmarkað sjálvur at krevja ómaksgjøld ella at broyta ómaksgjøld.

§ 15, stk. 1 tilskilar, at treytir fyri at hækka ómaksgjøld og at leggja nýggj ómaksgjøld á skulu greidliga standa í sáttmálanum. Tað merkir sambært Brúkaraumboðnum, at týðiliga skal vera greitt í avtalutreytunum, hvussu ómaksgjøld kunnu broytast og verða løgd á, og at tað ikki er nóg neyvt at skriva, at fyrivarni verður tikið fyri "hækkingum í prísi og ómaksgjøldum" so hvørt. Krøvini mugu heldur ikki sambært § 1 verða ósaklig og órímilig, og avtalutreytirnar eiga sambært Brúkaraumboðnum at geva brúkaranum møguleika at meta um, hvussu sannlíkt tað er, at ómaksgjøldini fara at hækka[2]. Brúkarin skal eisini hava møguleika aftaná at meta um, um broytingar eru í samsvari við avtaluna. Tað merkir sambært Brúkaraumboðnum, at tann vinnurekandi við varskógvan skal gera vart við við hvørjari grundgeving, ómaksgjaldið verður broytt ella verður álagt sambært avtalutreytum.

---

[2] Gyldendals babybogklub: j.nr. 2006- 1170/8-652 (avgerð frá danska brúkaraumboðnum)

Brúkaraumboðið heldur, at við § 15 er sett eitt almannarættarligt krav um, at brúkaraavtalur, sum eru í gildi, skulu vera skrivligar, tá ið avtalusambandið er knýtt at tí møguleika, at ómaksgjøld hækka, ella at nýggj ómaksgjøld verða løgd á. Tað skrivaða skal skiljast sum tøknineutralt, tað skal bara vera talan um ein varandi miðil.

## 5. § 15, stk. 2

§ 15, stk. 2 ljóðar soleiðis:

Broytingar í ómaksgjøldum ella innkrevjing av nýggjum ómaksgjøldum í einari avtalu, sum gongur yvir tíð, skulu altíð fráboðast við rímiligari freist, áðrenn hetta fær virknað fyri brúkaran.

Varskógvað verður um allar broytingar, men er talan um munandi broytingar ella um at leggja nýggj ómaksgjøld á, skal varskógvanin verða fráboðað hvørjum brúkara sær sambært § 15, stk. 3. Týdningurin í § 15, stk. 2 liggur tí serliga í kravinum um varskógvan við einari rímiligari freist.

Spurningurin um varskógvan sum almannarættarligt krav sambært § 15 má ikki koma í bland við kravið um, at broyting í ómaksgjaldi ella, at tað nýggja ómaksgjaldið avtalurættarliga skal vera heimilað í sáttmálanum millum vinnurekandi og brúkaran.

### 5.1 Varskó um smávegis broytingar

Allar broytingar skulu varskógvast. Eftir Brúkaraumboðsins tykki er beinleiðis varskógvan til hvønn einstakan altíð gagnligast, men tað er ikki lógarkrav, tá ið

talan bara er um at hækka eitt ómaksgjald eitt lítið sindur. Viðvíkjandi teimum førum, tá ið kravt verður at boðað verður hvørjum einstøkum frá, verður víst til part 6 um § 15, stk. 3.
Í teimum førum, tá ið samskift ikki verður við hvønn einstakan – sum, sum nevnt merkir, at ein broyting í verandi ómaksgjaldi ikki verður hildið at vera stórvegis, vil t.d. ein fráboðan á eini heimasíðu ella kunning í tíðindaskrivi eftir umstøðunum vera nóg góð varskógvan eftir § 15.

Viðvíkjandi krøvum, sum varskógvanin skal lúka, er eingin serlig útgreining í forarbeiðinum í sambandi við broytingar í ikki-týðandi ómaksgjaldi. Eftir Brúkaraumboðsins tykki má tað tó verða lagt til grund, at eisini í hesum førum skal vera brúkaranum innihaldsliga greitt, at talan er um varskógvan um at broyta eitt ómaksgjald, sum er, hvør broytingin er, t.e. hvussu nógv gjaldið verður hækkað. Henda kunning má harumframt ikki "verða fjald" í aðrari kunning frá tí vinnurekandi um somu leið.

### 5.2 "Við rímiligari freist"

Varskógvað skal vera í góðari tíð um broytingina ella nýggja ómaksgjaldið, áðrenn tað fær virknað fyri brúkaranum.

Tað skilst av forarbeiðinum, at tað verður treytað av eini ítøkiligari meting, hvat kravið um varskógvan "við rímiligari freist" merkir. Sum tættir, sum m.a. kunnu koma við í hesa meting , verður støddin á broytingini nevnd, og um hækkingin í ómaksgjaldinum er grundað í viðurskiftum hjá tí vinnurekandi sjálvum ella viðurskiftum uttaneftir, sum tann vinnurekandi ikki er harri yvir.

Brúkaraumboðið heldur, at í teimum førum, tá ið brúkarin hevur rætt at siga avtaluna upp sum fylgja av broytingini ella nýggja ómaksgjaldinum, má varskógvanin vera í so góðari tíð, at brúkarin hevur veruligan møguleika at brúka henda rætt, áðrenn hækkingin í ómaksgjaldinum ella nýggja ómaksgjaldið fær virknað. Tað hevur við sær, at brúkarin skal hava stundir til bæði at hugsa um, um avtaluviðurskiftini við tann vinnurekandi skulu halda fram, ella um aðrar møguleikar á marknaðinum og í teimum førum siga avtaluna upp. Harafturat kemur sjálv uppsagnarfreistin, og hon er avrádd í avtaluni millum tann vinnurekandi og brúkaran. Tað fer sostatt at verða treytað av teimum ítøkiligu umstøðunum, hvussu langt frammanundan, at broytingin ella nýggja ómaksgjaldið fær virknað mótvegis brúkaranum, at varskógvað skal verða. Avgerandi er, at brúkarin við at nýta vanligt uppsagnarvarskó, hevur rímiliga góða tíð at sleppa úr avtaluni og sleppa undan ómaksgjaldinum ella hækkanini í ómaksgjaldinum, um brúkarin ikki vil verða bundin av avtaluni longur.

## 6. § 15, stk. 3

§ 15, stk. 3 ljóðar soleiðis:

Er broytingin í ómaksgjaldi munandi, ella verður nýtt ómaksgjald kravt, skal hetta fráboðast brúkaranum við individuellum samskifti, áðrenn broytingin fær virknað. Hevur brúkarin rætt at siga avtaluna upp, skal hetta standa í fráboðanini, umframt við hvørjum treytum brúkarin kann siga avtaluna upp.

### 6. 1 Munandi broytingar

Eingin nágreinilig skilmarking er av innihaldinum í orðinum "munandi". Tvørturímóti er tað ein ítøkilig meting, nær ein broyting má haldast at vera munandi. Mett verður um, hvussu stór broytingin er, sædd í mun til gamla ómaksgjaldið og sædd í mun til virðið á høvuðsveitingini, sum teir týdningarmestu tættirnar.

Brúkaraumboðið heldur, at ein broyting má verða mett at vera munandi, er hækkingin 10 % ella oman fyri tað samanborið við gamla gjaldið, uttan so at broytingin má haldast at hava lítlan týdning í mun til virðið í høvuðsveitingini. Talan er um kumulativar treytir, t.e., at broytingarnar bæði skulu vera í tí støðd, nevnd er, í mun til gamla ómaksgjaldið og samstundis má ikki vera munalítil í mun til virðið á høvuðsveitingini. Í einum tulkingaríkastið í forarbeiðinum til donsku marknaðarføringslógina stendur, at ein broyting, sum er minni enn 0,2 % í mun til virðið á høvuðsveitingini sum útgangsstøði, má haldast at vera munalítil. Um ein broyting, sum er 0,2 % ella oman fyri tað, eisini kann vera hildin at vera munalítil, má eftir Brúkaraumboðsins tykki verða treytað av ítøkiligum umstøðum.

Verður ómaksgjaldið goldið tíðari ella sjaldnari enn høvuðsveitingin, má samanberingargrundarlagið verða stillað eftir tí soleiðis, at talan verður um eitt javnt tilvísingarskeið, tá ið mett verður, um "munandi ella ei."

Eisini aðrir enn nevndu tættir kunnu eftir forarbeiðinum hava týdning fyri metingina. Til dømis um onnur ómaksgjøld, knýtt at somu høvuðsveiting, hækka samstundis, kunnu tey gera munin í broyting, sum liggur á markinum til "munandi". Broytingar í vanliga príslagnum í samfelagnum gera eisini sítt til, tá ið mett verður um.

At hækka ómaksgjaldið beint eftir ella stutt eftir, at veitingin hevur verið marknaðarførd til serliga lagaligan prís, verður eftir Brúkaraumboðsins tykki eisini eftir umstøðunum við í metingini, um tað er "munandi ella ei", sama um talan er um hækking, sum er minni enn 10 % sammett við gamla ómaksgjaldið.

Metingin, um ein broyting má haldast at vera munandi, skal verða gjørd í mun til avtalu hjá hvørjum einstøkum brúkara. Tað hevur sostatt ongan týdning fyri metingina, hvussu stórur partur av viðskiftafólki er hjá tí vinnurekandi sammett við øll tey viðskiftafólkini, sum ávirkað verða av broytingini.

### 6.2 Framferðarháttur, tá ið samskift verður við einstakling

Sum nevnt, verður varskógvað við at samskifta við hvønn einstakan brúkara, tá ið talan er um munandi broytingar (ómaksgjaldshækkan) ella um nýggj ómaksgjøld, sum verða løgd á. Danska Brúkaraumboðið hevur í einum ítøkiligum máli[3] góðtikið varskógvanina ígjøgnum eina viðfesta rokning.

Sum grundstøði skal verða varskógvað í varandi miðli, til dømis einum brævi ella telduposti, smbr. eisini § 1 um góðan marknaðarføringssið. Hetta er tí, at brúkarar skulu hava møguleika at goyma týðandi broytingar í eini avtalu.

Danska Brúkaraumboðið hevur í ítøkiligum máli[4] givið til kennar, at vikið kann bara verða frá hesum útgangspunkti, hevur brúkarin greidliga góðtikið at fáa varskógvanina á einum miðli, sum ikki kann verða mettur sum varandi. Hetta kann henda við, at tað er greitt í avtalutreytunum, at broytingar í ómaksgjøldum ella uppkravi av nýggjum ómaksgjøldum verða varskógvaðar ígjøgnum tann ikki varandi miðilin. Málið snúði seg um eina varskógvan ígjøgnum eini sms-boð. Í lógarviðmerkingunum[5] frá 2004 til brúkaraavtalulógina er greitt, at vanligar

---

[3] TDC: j.nr. 2006-11133/5-125.

[4] Gyldendals babybogklub: j.nr. 2006- 1170/8-652.

[5] Folketingstidende 2003-2004. Ískoyti A 7594 f.

fartelefonir við teirri tøkni, ið tá var og sostatt eisini tí avmarkaðu goymsluni, ið var, helst ikki kunnu haldast at lúka krøvini til varandi miðil.

### 6.3 Innihaldskrav til varskógvan

Kravið um varskógvan skal tryggja brúkaranum møguleika at velja nýggja ella broytta ómaksgjaldið frá við heilt at sleppa úr avtaluni, og brúkarin skal tí verða kunnaður um teir møguleikar, ið hann ella hon hevur í avtaluni fyri at sleppa úr avtaluni, áðrenn broytingin í ómaksgjaldinum verður sett í verk. Sambært forarbeiðinum skal varskógvanin soleiðis lýsa neyvaru treytirnar fyri at siga avtaluna upp, m.a. hvussu long uppsagnarvarskógvanin skal vera og møgulig ómaksgjøld í sambandi við uppsøgnina.

Tað merkir í fyrsta lagi, at innihaldsliga skal vera brúkaranum greitt, at talan er um at varskógva eina broyting í ómaksgjøldum, ella at nýggj ómaksgjøld verða løgd á, hvussu stór hækkingin er í mun til verandi gjaldið. Henda kunning má heldur ikki "verða fjald" í aðrari kunning frá tí vinnurekandi, sum kemur samstundis.

Hevur viðskiftafólk sambært avtalutreytum rætt til at siga avtalu upp sum fylgju av nýggjum ómaksgjaldi ella hækkaðum ómaksgjaldi, skal tað, sum nevnt, eisini verða greitt í varskógvanini, m.a. eisini treytirnar fyri at brúka henda rætt.

Eisini í førum, tá ið tað ikki er greitt eftir avtalutreytunum, at brúkarin hevur rætt til at siga avtaluna upp sum fylgju av nýggjum ómaksgjaldi ella hækkaðum ómaksgjaldi, men har brúkarin hevur henda rætt sambært vanligum

avtalurættarligum aðalreglum, er tað skylda hjá tí vinnurekandi at kunna brúkaran um henda rætt. Hetta er eftir Brúkaraumboðsins tykki í § 1 um góðan marknaðarføringssið borið saman við endamálið í § 15.

## 7. Rættarvirknaður, verður § 15 o.a. brotin

§ 15 er sum nevnt ein almannarættarlig áseting, og brot á ásetingina kann hava við sær forboð og boð frá Brúkaraumboðnum eftir reglunum í løgini um marknaðarføringssið.

Eisini kann vinnurekandi sambært § 20, stk. 1, nr. 2, við dómi fáa álagt at rinda aftur ómaksgjald, sum ikki er kravt inn í samsvari við § 15 frá brúkarunum. Samsvarandi kann eftir umstøðunum verða leitað aftur til óheimilað ómaksgjøld, t.e. ómaksgjøld, sum ikki eru avtalað partanna millum eftir teimum vanligu borgararættarligu reglunum um tað.

Brot á § 15, stk. 3 verða revsað við bót, smbr. § 28 stk. 3. Brot á § 15, stk. 1 og 2 eru harafturímóti ikki revsiásett.

## 8. Avtalan millum tann vinnurekandi og brúkaran

Omanfyri eru almannarættarligu krøvini lýst, sum eftir § 15 galda fyri møguleikar hjá vinnurekandi í einum virkandi sáttmálasambandi at broyta ásett ómaksgjøld ella at leggja nýggj ómaksgjøld á. Ásetingin verður stuðlað av vanligu borgararættarligu reglunum í føroyskum rætti um avtalur.

Tann vinnurekandi kann ikki av sínum eintingum áleggja ella hækka ómaksgjøld. Tað skal vera heimilað í avtaluni partanna millum, og sostatt vera partur av avtalugrundarlagnum, sama um talan er um sáttmála, sum samráðst hevur verið um við hvønn einstakan, ella standardavtalutreytir ella vanligar handilstreytir hjá vinnurekandi. Er slík avtala ikki gjørd partanna millum frammanundan, mugu nýggj ómaksgjøld ella broytingar, sum ikki eru brúkara til fyrimunar, í útgangspunktinum verða javnmett við at gera nýggja avtalu, sum krevur greidligt samtykki frá brúkaranum, áðrenn broytingar koma í gildi.

Víst verður annars til vanligu borgararættarligu reglurnar í føroyskum rætti um at gera avtalur, m.a. tær serligu modifikatiónirnar fyri avtaluviðurskifti millum vinnurekandi og brúkarar. Í sambandi við avtalutreytir um ómaksgjøld verður viðmerkt, at eftir Brúkaraumboðsins tykki er sum útgangsstøði ikki nóg mikið, at upplýsingarnar bara eru til fals til dømis á heimsíðuni hjá vinnurekandi sum partur av handilstreytunum hjá viðkomandi. Brúkararnir skulu týðiliga og greitt verða gjørdir varugir við slíkar upplýsingar, áðrenn avtalan verður gjørd, áðrenn treytin kann verða mett avtalað partanna millum.

Fyri at alt skal vera í lagi, skal viðmerkjast, at sama um tað í ítøkiligum føri ikki skuldi verið talan um eitt ómaksgjald, sum tað skilst í lógini um marknaðarføring og § 15, sum fylgja ikki kann brúkast til kostnaðin, galda reglurnar omanfyri og aðrar vanligar avtalurættarligar aðalreglur sjálvandi eisini fyri slíkan kostnað. Hesir kostnaðir skulu sostatt eisini verða avráddir partanna millum, smbr. omanfyri, og at teir til dømis heldur ikki kunnu leggjast á ella broytast so hissini.